

# Oljuprísurin søguliga lágur í juli

Jógvan Hugo Gardar

31.07.2015 - 11:53

Oljan.fo

Oljuprísurin heldur fram at lækka í dag. Og tað sær út til at juli skal gerast ein mánaði við søguliga lágum oljuprísi, skrivar E24.

Um ellivu tíðina fyrrapartin kostaði Norðsjóvaroljan Brent 52,65 dollarar fyri fatið. Tað er ein lækking uppá 1,29 prosent samanborið við prísin í gjár. Amerikanska lættoljan WTI kostaði samstundis 47,56 dollarar fyri fatið, og hetta er 1,78 prosent lægri enn í gjár.

Sambært Reuters-tíðindamanninum Jamie McGeever er tann amerikanska lættoljan lækkað við 20 prosentum bara í juli, og so stóra lækking hevur ein ikki sæð eftir einum mánaði síðani oktober 2008.

Oljuprísurin hevur verið undir trýsti farnu vikurnar, serliga av fíggjarliga illveðrinum sum hevur rakt kinverska fíggjarheimin, umframt at nú verður bíða eftir at Iran aftur sleppur at selja olja á heimsmarknaðinum.